## Bjóðaðu Fríðrikki og Mary til Føroya

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Edmund Joensen, løgtingsformaður, hava bjóðað danska krúnprinsaparinum til Føroya**

KONGLIGT BRÚDLEYP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein vitjan í Føroyum verður nú eisini sett á skránna hjás danska krúnprinsaparinum.

Nú Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Edmund Joensen, løgtingsformaður, hava verið í Brúdleypi hjá Fríðrikki krúnprinsi og Mary Donaldson, nýttu teir høvi til at bjóða teimum báðum til Føroya at vitja.

Teir báðir gjørdu av sínamillum, at komu teir soleiðis fyri, at teir fingu orð á krúnprinsaparið, skuldu teir bera innbjóðingina fram.

Og tað eydnaðist.

Teir komu á til við tey nýgistu og har søgdu teir, at tað hevði glett føroyingar at fingið høvi at hitt krúnprinsaparið í Føroyum.

Fríðrikur prinsur segði, at tað fór at knípa at fáa við á skránna í ár, men hann helt, at tað var ein møguleiki næsta ár.

Sostatt siga tey, sum umboðaðu Føroyar í Brúdleypinum, at tey hava eina grundaða vón um at Føroya fáa kongliga vitjan næsta ár.

Annars var nógv á skránni hjá teimum føroysku umboðunum í brúdleypinum

Týskvøldið vóru føroysku umboðini til døgverða í riddarasalinum í Christiansborg. Har var talan um ein døgverða, har politiska skipanin í ríkinum var boðin, umframt onnur almenn umboð og umboð fyri aðalin.

Hóskvøldið vóru tey til serframførslu í Kongliga leikhúsinum og fríggjadagin var so sjálvt brúdleypi og har vóru føroysku umboðini bæði við í kirkju og til døgverða aftaná í veitslutjaldinum við Fredensborg.

Bæði Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Edmund Joensen, løgtingsformaður, eru samdir um, at hetta hevur verið eitt stórt upplivilsi, hóast tað hevur verið strævið.

Tað var long bíðitíð mangan, men tað, sum var strævnast, vóru kortini tey sera strongu trygdartiltøkini. Vit vorðu koyrd allastaðni í bussi, hvussu stutt tað nú var, tey skuldu fara og tað kundi ikki koma uppá tal at fara burturúr fylginum. Samstundis vóru partar av Keypmannahavn avbyrgdir.

Tað gjørdi, at tey føroysku umboðini fingu tað ikki akkurát, sum tey ætlaðu tað. Í kongliga leikhúsinum vóru tey í føroyskum klæðum, men tað var alt ov heitt at vera í.

Í sjálvum brúdleypinum var ætlanin eisini at fara í føroysk klæðir í kirkjuna, men av tí, at ongin møguleiki var fyri at fara til húsar at skifta, áðrenn døgverðan, varð avgjørt at fara í veitsluklæðini beinanvegin.

Allastaðni var tað so, at allir gestirnir komu fyrst og so komu tey kongligu seinast. Tá ið eitt tiltak var liðugt, bíðaðu øll, til tey kongligu vóru farin.

## Brúdleypsgestir

Á Hotel Plaza í Keypmannahavn vóru tey ikki sørt stolt fríggjadagin. Tey høvdu ikki færri enn fýra kongaligar brúdleypsgestir búgvandi, og tað var opinbart nakað sum gav fýra stjørnaða hotellinum eina eyka stjørnu í hattin.

Siðbundna hotellið, sum Fríðrikkur kongur VIII í síni tíð gav boð byggja beint við síðuna av Hovedbanegården, stóð liðugt í 1913, og var fyrstu árini fast gistingarhús fyri ferðandi gestir hjá kongshúsinum.

Síðan tá er nógv hent, og gestir hjá kongshúsinum koma ikki longur við toki. Men brúdleypsdagin, var tað sum kendi hotellið søgunnar veingjasuð, tá teir fýra gestirnir úr Føroyum komu út úr lyftuni, pyntaðir frá topp til tá í pingvindraktum og skræddaraseymaðum kjólum.

# Sum at vera mitt í einum ævintýri

**– At vera í brúdleypi hjá krúnprinsinum , var sum at vera mitt í einum ævintýri. Men tey kongligu eru løtt at vera saman við og tað er nokk at duga vanligan fólkaskikk , sigur løgmaður**

KONGLIGT BRÚDLEYP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta var sum at vera mitt í einum ævintýri.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður er akkurát afturkomin av kongligum brúdleypi í Keypmannahavn.

Saman við konuni var hann boðin í brúdleyp hjá Fríðrikki krúnprinsi og Mary Donaldson

Og tað var eitt upplivilsi fyri lívið. Men tað var strævið, tí tað vardi tað mesta av einari viku.

– Eg haldi, at størsta og mest hátíðarliga upplivilsi var løtan í kurkjuni, tá ið vígslan var.

– Mær dámar sera væl kirkjutónleik og urgutónleik, og tónleikurin, vit hoyrdu í kirkjuni, var heilt fantastiskur.

Og Jóannes Eidesgaard sigur, at júst í kirkjuni og undir borðhaldinum aftaná, fekst besta prógvið um, at hóast tey kongligu eru eitt sindur omanfyri okkum onnur, eru tey ikki annað enn menniskju innast inni, tí har vístu tey akkurát somu kenslur, vit vanlig fólk vísa á einum slíkum degi, tí tað var týðiligt, at tey vóru bæði kensluborin við tárum í eyguni, men so høvdu tey eisini tey stóru smílini.



*Kongshúsið hevur djúpar røtur í fólkinum og eisini í Føroyum eru nógv, sum eru góð við kongshúsið, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

### Hitti kend fólk

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað var ógvuliga stuttligt at hitta øll hesi kendu fólkini, sum vit annars bara síggja í sjónvarpi og lesa um í bløðunum.

Í Riddarasalinum á Christiansborg sat hann til borðs saman við Konstantin, kongi og ímeðan bíðað varð eftir døgverðanum á Fredensborg, fekk hann sær eitt prát við kenda sjónleikaran, Roger Moore, sum er kendur frá fleiri filmum um James Bond.

– Hann stóð í barrini og fekk sær eitt glas av sjampanju og eg kundi ikki lata vera við at spyrja hann, um tað nú var tað rætta slagið.

Hetta fangaði Roger Moore og vit prátaðu eina løtu um leyst og fast. Hann visti væl, hvar Føroyar vóru. Hann er jú breti og hann minnist, at fyrr plagdu tey altíð at lurta eftir veðurtíðindunum úr Føroyum.

Annars var nógv bíðitíð nógva staðni, so tað beyðst gott høvi at fáa eitt prát við aðrar gestir. Og tað gjørdi løgmaður eisini. Tað bar eisini til at fáa eitt politiskt prát, hóast vit avgjørt skulu vita, hvar markið er eina løtu sum hesa.

Annars heldur hann ikki, at tað var so strangt mark fyri, hvussu ein skuldi bera seg at í sovorðnum selskapi.

– Bara tú vísur vanligan fólkaskikk, sum tú hevur lært heimanífrá, er tað ongin trupulleiki við tí. Stívari enn so, var tað ikki. Og gjørdi tú okkurt skeivt, var tað als ongin, sum tók sær tykni av tí.

### Alt fólkið var við

Jóannes Eidesgaard sigur, at eitt, sum hugtók hann ógvuliga nógv, var at síggja, hvussu alt tað danska fólkið livdi við í brúdleypinum.

– Hetta var eitt hátíðarhald, sum øll tann danska tjóðin tók lut í. Sama, hvar tú ferðaðist, á hotellinum, í einum hýruvogni, ella hvar tað so var, so var prátingarevnið tað kongliga brúdleypi.

Spurningurin er so, um tað er rætt, at ganga so høgt upp í eitt kongligt brúdleyp.

Tað hevur løgmaður ongar trupulleikar við.

– Eitt kongligt brúdleyp er í veruleikanum ógvuliga meinaleyst og eg haldi, at tað er ógvuliga gott, at ein heil tjóð er til reiðar at sleppa gerandisdegnum fyri at savnast um nakað positivt og meinaleyst.

Men hevur kongshúsið nakran týdning fyri Føroyar?

– Ja, tað haldi eg. Tað eru nógvir føroyingar, sum fylgja væl við tí, sum fyriferst í danska kongshúsinum og sum eru góðir við kongshúsið. Ikki bara í tí eldra ættarliðnum, men eisini tey yngru fylgja ógvuliga væl við í tí, sum hendir.

Jóannes Eidesgaard heldur, at kongshúsið hevur eitt ógvuliga stóran, ímyndarligan týdning og tað er ein skipan, sum tey allarflestu vilja varðveita.

Men hann heldur heilt avgjørt eisini, at ein høvuðsorsøk til tað, eru tey, sum manna kongshúsið.

– Margretha Drotning hevur ómetaliga hegnisliga staðið á odda fyri kongshúsinum og hon hevur dugað sera væl at fylgt við tíðini. Samstundis eru tey í kongshúsinum borgarliga gift og sostatt er kongshúsið eisini blivið meiri folksligt.

– Tí er stendur onki kongshús í heiminum sterkari enn tað danska. Tí eru allir politiskir flokkar, uttan eindarlistin, sinnaðir at varðveita kongshúsi.

– Eisini føroyingar eru sinnaðir at varðveita kongshúsið og sjálvt tá ið fullveldisprátið var upp á tað harðasta, var ongin ivi um, at kongshúsið skuldi varðveitast, sigur løgmaður.



# Eitt fantastiska stórsligið ævintýr

**Soleiðis lýsir løgmansfrúan krúnprinsabrúdleypið. – Serliga allir hesir ótrúliga flottu prinsessukjólarnir mintu teg á, at hetta ikki var nakað vanligt brúdleyp. Alt glitraði og glimtaði, óansæð hvønn veg tú hugdi, og so vóru øll hesi kongaligu, sum tú bara sært í sjónvarpinum ella lesur um, til staðar. Tað var ein veruliga ein uppliving fyri lívið, sigur Anita Eidesgaard**

PRINSABRÚDLEYPIÐ
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin*



*Jóannes, Anita, Edmund og Edfrið á veg í brúdleyp*

*Mynd: Símun V. Hansen*

Týskvøldið vóru brúdleypsgestirnir bodnir til døgverða hjá drotningini.

– Har var heilt ótrúliga flott. Stórar ljósakrúnur av krystalli og flott, flott veggjaprýði. Har fekk eg eina góða løtu at ganga, bara við at ganga runt og hyggja. Tað var ótrúliga facinerandi, sigur Anita Eidesgaard.

– Tá vit komu, blivu vit rópt inn, parvís. Og har stóð so øll tann kongeliga familjan "på rad og række", bæði drotningin og prinsurin, brúðarparið og Alexandra og Joachim. Har stóðu eisini familjan hjá Mary. Og tað var sum í Føroyum, at man heilsaði uppá, tók í hond og segði tillukku. Eg var forferdiliga nervøs, var bangin fyri at detta í kjólanum. Men tað gekk fínt, so nú havi eg heilsa uppá alla kongsfamiljuna, greiðir Anita frá.

Men hon sigur, at tað var ein forferdiliga long bíðitíð.

– Vit bíðaðu og bíðaðu. Tað var rættiliga strævið at ganga og balancera á hesum høgu hælunum við einum vælkomstglasið í hondini. Tað gekk long tíð inntil vit sluppu at seta okkum til borðs.

– Vit fingu eitt kort, har tað stóð hvar vit skuldu sita. Undir døgverðanum sótu tey við smá borð, við eini 8 fólkum við hvørt. Anita og Jóannes Eidesgaard sluppu ikki at sita saman. Við borðið hjá Anitu sótu Anker Jørgensen, Margrete Auken, ein gomul hoffdama, allarhelst hjá dronning Ingrid, ríkispolitichefurin og "fødevare-department chefurin". Har sótu eisini tvey onnur, ið Anita ikki kendi.

– Tað var stórsligið, sigur hon.

Tað næsta tiltakið, sum tey vóru boðin til, var gallashowið í Kongeliga Teatrinum.

– Har var alt møguligt, t.d. ein ballett, ein operetta og ein rockbólkur. Alt handlaði um kærleika. Har sluppu vit at sita saman, og vit sótu faktiskt rættiliga væl fyri. Vit sótu frammarlaga, niðri á gólvinum. Tað var gott, tí uppi á balkongunum bleiv so forferdiliga heitt. Har vóru um 800 fólk inni, og vit vóru í føroyskum klæðum, men tað bilti ikki við hitanum allíkavæl, sigur Anita.

Í steðginum vóru tey boðin útum, har tey fingu ymiskan fingramat. keks við paté, pinnamat o.t.

### Vígslan

– Sjálvur brúdleypsdagurin var forferdiliga langur. Vit byrjaðu longu á middegi at pynta okkum, tí kl 14 máttu vit vera klár at fara. Systur og systurdóttur mín komu at hjálpa mær at lata meg í, og tað var gott, tí eg hevði eitt corsage, sum skuldi bindast í rygginum. Tað tók sína tíð, sigur Anita og flennir.

Hon sigur frá, at tey tóku ein taxabil inn á Christiansborg, har kongshúsið hevði skipað fyri, at bussar komu og avheintaðu gestirnar. Hetta var gjørt av trygdaáðum. Allir gestirnir, sum skulu við til brúdleypið, skuldu í hesar góðu bussarnar og vórðu so førdir við politieskortu til kirkjuna. Anita sigur, at trygdin var í topp.

– Tað vóru politistar allastaðni. Eg veit ikki hvussu nógvar motorsúkklur ikki koyrdu framman- og aftan fyri bussin hjá okkum. Og har vóru eisini nógvir politistar inni í bussinum. Tað var gott, men tað var samstundis eitt sindur ræðandi. Tí man fór at hugsa, um tað veruliga kundi henda nakað. Man veit aldrin, og har vóru altso nógvir týdningarmiklir persónar, greiðir hon frá. Hon sigur, at løgreglan hevði kannað øll dekslini á vegnum, sum bussarnir skuldu koyra. Hetta fyri at tryggja, at eingin bumba var har. – Tað var eitt sindur óhugnaligt, heldur Anita.

– Tá vit komu til kirkjuna var ein forferdilig pressa. Har vóru so nógvir fotografar og sjónvarpsmenn, at eg havi aldrin sæð nakað líknandi. So tá hugsaði man aftur um at ganga rætt og ikki detta.

– Vit komu til kirkjuna kl 15.00, so tað var aftur long bíðitíð har, tí vígslan byrjaði ikki fyrr enn hon var farin av fýra. Vit sótu væl fyri, men eg sá allíkavæl ikki alt, sum fólk hava sagt aftaná, t.d. at krúnprinsurin græt og sovorði. Man sat har, og kundi ikki so væl fara at hálvreisa seg fyri at síggja enn betur. Ella strekkja hálsin úr lið, sum man kann tilláta sær í brúdleypum her heima. Har mátti man allatíðina hugsa um, at sita so pent og "præsentabelt" sum gjørligt. Bæði tí, at har sótu prinsar og prinsessur allastaðni runt um, og tí at sjónvarpið var allastaðni inni í kirkjuni. Men vit sóu beint í nakkan á parinum, greiðir Anita frá.

Um vígsluna sjálva heldur hon, at hon var nakað tað sama sum ein og hvør onnur víglsa. Tað einasta sermerkta vóru kjólarnir hjá konufólkunum, kongakrúnurnar og diademini. – Tað var heilt fantastiskt at síggja, heldur Anita.

Eftir vígsluna, skuldu gestirnir aftur koyrast í bussunum.

– Tá var ein japanesari komin uppí okkara buss. Bussurin hevði ikki koyrt meira enn ein metur, tá hesin góði japanesari uppdagaði, at hann var komin skeivt. Okkara bussur koyrdi hagar brúdleypsveitslan skuldi vera, men hann var ikki boðin til veitsluna. Hann bað um at sleppa av bussinum aftur, men har var einki at gera. Hann slapp av trygdaráðum ikki úr bussinum og mátti so pent koyra við okkum allanvegin. Tað var onkur sum gjørdi vrøvl um, at tað skuldi vera so fýrakantað við trygdini, men tað skilji eg allíkavæl væl, sigur Anita. – Hann kundi altíð havt lagt eina bumbu onkustaðni, sigur hon.

### Brúdleypsveitslan

– Áðrenn brúdleypsdøgverðan var aftur ein forferdilig bíðitíð. Vit sluppu ikki til borðs fyrr enn klokkan var 21.30. Vit fingu reinsdjórakjøt, eplir og dipp. Tað smakkaði væl, men tað var ikki nakað soleiðis heilt fantastiska specielt, sigur Anita.

– Men áðrenn døgverðan, tá eg var komin afturum mín stól at standa, kom ein ung dama og skuldi innum meg. Hon var bæði blíð og týð, og tá sá eg, at tað var Carolina av Monaco. Vit prátaðu eina góða løtu, og tað vísti seg at hon visti nógv um Føroyar, og at hon faktiskt hevur verið her einaferð í 2 dagar. Hon hevði verið við einum cruise-skipið og hevði tí verið í Havnini. Hon var forferdiliga fitt. Men so kom ein maður og setti seg ímillum okkum báðar, og tey fóru at tosa franskt, so tá fekk eg ikki so nógv við meira, sigur Anita og flennir.

Undir hini liðini á henni sat ein Guvernørur frá Tasmania, sum eisini var óalmindiliga fittur og lættur at práta við.

– Eg slappaði heilt av og hugnaði mær ófórt. Tað var sum eitthvørt annað brúdleyp, serliga tá tú hoyrdi talurnar um parið. Um kenslur og hugsanir, sum tey hava havt. Tey eru bara vanlig fólk, eisini allir hini kongaligu gestirnir.

– Eg og síðumaðurin frá Tasmanien samdust tó um, at tað var for nógv gjørt burturúr hesum brúdleypinum. Man ger sær tankar, sum man situr har ímillum øll hesi kongaligu fólkini, sum í grundini eru ganska vanlig fólk. Tað er langt úti, at tey gera so nógv burturúr. Tað var for nógv av tí góða, heldur Anita.

– Tað var sum eitt vanligt brúdleyp, bara nógvar ferðir meira stórsligið. Men sjálvandi, tað var ótrúliga flott at uppliva. Tað var sum eitt ævintýr, og eg fari aldrin at gloyma tað. Tað er bara so forferdiliga… uppblást tað heila, sigur Anita.

– Alt í alt, haldi eg, at tað varð nøkulunda tað, sum eg væntaði mær áðrenn eg fór avstað. Tað var ein forferdiliga góður túrur, og eg havið fingið minnir fyri lívið. Og eg kendi meg eisini sum eina prinsessu í mínum kjóla, sigur hon.

– Eg helt mín kjóla verða flottari enn onkrar av teimum, sum eg sá. Mín var bara ikki so glitrutur, sum prinsessukjólarnir vóru, sigur hon.

Anita væntar tó ikki at fara í kjólan aftur nakrantíð, men hon vónar, at onkur av ommudøtrunum kann fara í hann onkuntíð. Kanska at giftast í. Og tað hevði jú verið ógvuliga apropos.

### Edfríð og Edmund

Hitt føroyska parið sum var í brúdleypinum, vóru Edfríð og Edmund Joensen. Edmund segði sum Anita, at tað var ein heilt fantastiska stór uppliving. Eisini tað, at síggja áhugan, sum danska fólki hevði fyri brúdleypinum. Tey stóðu úti í regninum til langt út á náttina, fyri at fáa eyga á parið og heiðra tey, greiðir Edmund Joensen frá.

– Tað er tekin um, hvussu væl tað danska kongshúsið hevur dugað at tillagað seg. Tað er ein ógvuliga fín balancugongd, sum ikki er løtt at halda. Men tey hava megnað tað ótrúliga væl, heldur hann.

– Eg og Edfríð sluppu heldur ikki at sita saman við borðhaldið. Eg hevði eina unga damu frá Tasmanien sum borðdamu, hon mundi vera í slekt við brúðrina. Eg haldi, at pápi hennara var tað, tey nevna fyri uncle at Mary. bæði eg og Edfríð sótu væl fyri, nær høvuðsborðinum, so vit sóu væl brúðarparið og alt sum gekk fyri seg.

Edmund heldur, at tað alt í alt var sum eitt ævintýr.

– Har vóru so nógvir gestir allastaðni frá, og øll vóru fín og pyntað. Tað var heilt vist ein uppliving, sum ikki verður gloymd aftur, sigur hann at enda.

Ætlanin var at fáa eitt brúdleypsprát við Edfríð eisini, men eftirsum hon varð verandi eftir í Danmark nakrar dagar, bar ikki til at fáa fatur á henni.